DAGSINS MEINING

Dilettantarí í Vinnumálastýrinum?

Vit hava á hesum stað gjørt vart við, hvussu illa alt málið um Landsverkfrøðingsstovnin var handfarið frá fyrst til síðst. Løgmansskrivstovan kannaði sjálva uppsøgnina av Henning Jacobsen, undanfarna Landsverkfrøðingi, og ikki óvæntað gjørdi miðfyristingin einki við miðfyrisitingina. Á hesum stað var gjørt vart við tað óhepna í, at man kannaði seg sjálvan.

Serliga eigur at vera lagt til merkis, at undanfarni landsverkfrøðingur segði seg ivast í førleikanum hjá umsitingini í Vinnumálastýrinum. Nakað sum táverandi landstýrismaður Finnbogi Arge gjørdist rættiliga firtin um. Í hesum sambandi kunnu fólk lesa frágreiðingarnar, ið deildarleiðarnir á Landsverkfrøðingsstovninum gjørdu eftir uppsøgnina av Henning Jacobsen. Har eru avrit av brævaskifti og øðrum, ið kemur í eitt heilt annað ljós, eftir at Vinnumálastýrið er sett upp á pláss av Løgtingsins Umboðsmanni, ið hevur kannað málið um setanina av nýggjum landsverkfrøðingi.

Umboðsmaðurin, ið vit hava bíðað eftir í 20 ár, hevur gjørt álit, ið harðliga átalar Vinnumálastýrið. Umboðsmaðurin kann ikki taka støðu til mál áðrenn 2000, og tí kann hann ikki taka støðu til tað, ið fór fram, tá landsverkfrøðingurin varð uppsagdur, og Vinnumálastýrið kom niðan á Landsverkfrøðingsstovnin við Reidar Nónfjall, ið tá skuldi vera stjóri á einum samanlagdum Landsverkfrøðingsstovni og Strandferðslu. Aftur her hevði Vinnumálstýrið ikki gjørt sítt heimaarbeiði ordiligt, og hevði gloymt, at viðvíkjandi størri broytingum sum at samanleggja stovnar, so skulu fakfeløg kunnast og takast uppá ráð.

Tá nú hesin lemjandi kritikkur er komin, so er grund til at krevja eina uttanveltaða kanning av øllum málinum um Landsverkfrøðingin frá fyrst til síðst. Vit hava onga vissu fyri, at brot á góðan fyrisitingarsið bert varð framt í ár 2000.

Finnbogi Arge og Bjarni Djurholm, sum báðir proklameraðu fyri øllum Føroya fólki hvussu professionel og dugnalig umsitingin í Vinnumálastýrinum var, mugu í dag kenna seg rættiliga illa. Vikuligi litfaldarin hjá Fólkaflokkinum rósti eisini Vinnumálastýrinum í samband við Landstýrismannaskiftið í hesum valskeiðnum, og burdi hetta fingið allar alarmklokkur at ringt beinanvegin.

Hóast setanin ikki nýtist at ganga um, so má tað vera løgið at sita í einum starvi, har ein veit, at setanin ikki fór fram á rættan hátt.

Málið her vísir meira enn nakað annað virðið í Løgtingsins Umboðsmanni. Vinnumálastýrið hevur fingið eina so stóra átalu, at nú má alt málið um Landsverkfrøðingin trevlast uppaftur við objektivum brillum og teir politiskt ansvarligu átalast.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Takk til Sambandsflokkin

Marjus Dam
løgtingsmaður

Tøkk til Sambandsflokkin fyri at hann, sjálvt í andstøðu, gjørdist lykilin til at Vágatunnilin fór ígongd. Ótøkk til Fólkaflokkin og Jørgin Niclasen fyri loysingina og fullveldið, ið hevur skaðað Føroyar í 4 ár. Vónandi fær hendan skaðasamgonga mønustingin á komandi løgtingsvali.

Vágatunnilin
Sambandsflokkurin hevur, allur sum ein, staðið saman um at Vágatunnilin skuldi byggjast. Tað var undir leiðslu av Sambandsflokkinum, at 20 milliónir kr í 4 ár í fyrstu atlogu vórðu settar av til at gera arbeiði í 1997. Um vit høvdu verið í samgongu, so hevði bert verið byrjað áðrenn samgonguskeiðið var hálvrunnið. Vit minnast øll, at trupulleikar vóru í samgonguni um hetta mál. Ósemjan í samgonguni vóru høvuðstíðindini í langa tíð í fjøldmiðlunum. Ikki at arbeiðið skuldi gerast, men hvør skuldi gera tað. Tjóðveldisflokkurin segði Landsverkfrøðingurin, Fólkaflokkurin segði at tað skuldi útbjóðast.

Sambandsflokkurin gjørdist lykilin:
Vónandi minnist Jørgin Niclasen, hvussu semingsuppskotið frá Sambandsflokkinum fekk allar flokkar at taka undir við hesum málið, so tað fór í gongd. So hóast Sambandsflokkurin var í andstøðu, so kom hesin Sambandsflokkur nevniliga at gerast lykilin í tryggjaði, at hetta arbeiði kom ígongd. Um samgongan skuldi gera tað, so fór hetta mál í "fisk" uppá spurningin hvør í skuldi gera tunnilin. Tí gingu nevniliga 1? ár, áðrenn málið kom í Løgtingið. Finnbogi Arge segði einaferð eg tosaði við hann, at um málið fall í Løgtinginum, so kom tað at vera lagt í eina skuffu, og kom ikki at verða tikið framaftur. So tað var sera neyðugt at finna eina semju, so meiriluti fekst í Løgtinginum fyri hesum máli. So Jørgin Niclasen og onnur loysingarfólk í Vágum hava nógv at takka Sambandsflokkinum fyri, sjálvt um hann situr í andstøðu. Eg fari eisini at siga, at Sambandsflokkurin í hesum málið samstarvaði við aðrar flokkar, ikki minst Fólkaflokkin. Vit tóku nevniliga undir við tí leisti í Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin byrjaðu við í 1997. Tí var tað bert náttúrligt fyri okkum at fremja borgarligan Sambandspolitikki saman við Fólkaflokkinum í hesum máli, sjálvt um vit vóru í andstøðu. Vónandi kunnu vit samarbeiða skilagott tað ið eftir er av hesum valskeiði.

Men Jørgin og Fólkaflokkurin skal vita eitt: Vit siga ja til framburð. Tí siga vit nei til loysing.

Vit vilja tryggja Føroyar.

Barnagarðurin er karmur fyri einum vælvirkandi Landssjúkrahúsið

Skriv til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann

Annita á Fríðriksmørk
tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin

Nú má hesin *anti-Suðurstreym-politikkur* halda uppat! Undirritaða vil heita á landsstýrismannin í almanna og heilsumálum, um at bera so í bandi, at barnagarðurin til landssjúkrahúsið verður bygdur, og ikki ganga undir trýst frá ávísum politikarum, sum vanliga brúka anti-suðurstreym sum politiskt valagn.

Barnagarðurin við landsjúkrahúsið er eitt bráðneyðugt tiltak, so at:

- tey smábarnaforeldur, sum starvast har, eisini kunnu arbeiða um kvøldarnar og um næturnar, og
- vit kunnu fáa tað neyðugu arbeiðsmegina hendanvegin, sum skal til fyri, at landssjúkrahúsið kann virka, sum eitt vælvirkandi Landssjúkrahús.

At eg reisti spurningin í tinginum hósdagin, hevur eftir øllum at døma fingið aðrar tingmenn at ressast og royna soleiðis at forða landstýrismanninum at fara víðari við málinum. Slíkt átak frá politikarum má byggja á vantandi vitan, um umstøðurnar hjá smábarnaforeldrum í Havn, og í hesum føri hjá smábarnforeldrum, sum starvast á landssjúkrahúsinum og í øðrum kvøld og náttarvaktum her í býnum.

Foreldur í dag hava ein øðrvísi tørv enn foreldrini høvdu fyri nøkrum árum síðani. Tað gamla bygdamynstrið, sum var kent í Føroyum, og sum gjørdi, at millum onnur ommur og abbar vóru um børnini dagliga, er so at siga burtur, og einamest í Havnini. Hetta ger, at tørvurin á einum barnagarði, sum er opin dømgnið runt, er nógv størstur í Havnini.

Samfelagið og vit politikarar krevja:

- at landssjúkrahúsið er opið dømgnið runt,
- at ungir læknar og ungar sjúkrasystrar starvast har dømgnið runt,
- at hesi búgva rímiliga nær landssjúkrahúsinum,

Táið soleiðis er, so kunnu vit ikki annað enn rokna við, at her er talan um starvsfólk, sum eru ung, og sum tí heilt naturliga eiga smábørn. Og skulu vit hava hesi starvsfólkini at arbeiða á einum vælvirkandi landssjúkrahúsið, so er eisini neyðugt, at karmarnir rundan um starvið er á einum rímiligum støði, sum ger tey før fyri at fara til arbeiðis og før fyri at gera eitt dygdargott arbeiði. Eg vil tí staðliga heita á landsstýrismannin um at bera so í bandi, at barnagarðurin við landssjúkrahúsið gerst veruleiki.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Eitt ár í býráðnum (6)

Valgreinir og politisk úrslit

Jógvan Arge
býráðslimur í Havn fyri Tjóðveldisflokkin

Eftir eitt ár í býráðnum kann gerast upp, um nakað er komið burtur úr teimum málum, sum eg skrivaði um upp undir valið í november 2000.

Fyrst er at siga, at okkara flokkur kom í minniluta, so valdið er avmarkað, men býráðslimir samarbeiða um tey flestu málini, so vit hava høvi til at vera við til at loysa mál úr lagdi og fáa tey framd.

Frælsur ítróttur í Havn
Ítróttarvøllurin til frælsan ítrótt var eitt mál. Eg ivaðist í, um nakar dugur var í at tosa um at bróta niður á Tórsvølli fyri at fáa pláss til rennibreyt, nú byggingin var komin so langt.

Tað havi eg hug at halda framvegis, men tað hóvar mær líka illa enn, at rennibreytin ikki er har. Hevði hon verið, so hevði lív longu verið á Tórsvølli hvønn einasta dag.

Serkønir siga mær, at tað er ivasamt, um Hoydalar klára at hýsa slíkum vølli. Sama er at siga um aðrar møguleikar nærri Gundadali.

Kanska er besti møguleikin at fara út í Vesturbýin á eina trød inn av SEV-húsinum at gera vøll til frælsan ítrótt. Kommunan hevur sett hetta øki av til ítróttarendamál.

Á fíggjarætlanini fyri 2002 hava vit í aðru syftu tikið undir við at játta 500.000 krónur í íløgum í ítróttarøki í Vesturbýnum. Okkum hevði dámt betur, at meir varð játtað, men tað gekk ikki.

Mentamálanevndin fer væntandi skjótt at stinga út í kortið, hvussu hetta ítróttarøkið skal skipast. Býráðið hevur frammanundan lagt 3 mió kr. í grunn at gera rennibreyt fyri, og tankar eru eisini frammi um ítróttarhøll vestanfyri.

Tey gomlu og býlini
"Kommunurnar kunna ikki bara hyggja at, meðan summir av teirra íbúgvum liva sítt lívskvøld í trega og einsemi", skrivaði eg um møguleikarnar hjá teimum gomlu at fáa innivist.

Hetta er eitt málsøki, sum í dag liggur undir landinum. Landsstýrið yvirtók eldraøkið, tá kommunurnar tóku alla barnaansingina upp á seg í fyrraárið.

Kortini er Tórshavnar Býráð komið væl áleiðis við ætlanum um at byggja eitt røktarheim fyri minnisveik,. Húsini hava verið boðin út, og tilboð eru komin inn. Ætlanin er, at 16 fólk skulu fáa innivist á hesum heimi, ið verður bygt í Vallarlíð.

Vit tóku hendan dagin undir við at játta 7,5 mió kr. til byggingina. Samstundis verður arbeitt fyri at fáa landið at átaka sær sín part, 50 prosent.

Marinustøðin við Hoyvíkstjørn varð keypt fyri ársskiftið 2001. Sosiala nevnd kannar, hvussu mest fæst burtur úr henni til frama fyri okkara eldru borgarar.

Arbeitt verður við møguleikum fyri, at hon verður nýtt sum viðgerðarstovnur og umlættingarstovnur á ymsan hátt. Sum eg havi skilt, liggur spurningurin um at gera Marinustøðina til røktarheim burtur av ikki so frammarlaga í løtuni.

Eitt sjónarmið er, at saman um tikið er fult so gott, at møguleikarnir fyri góðari viðgerð og hollari umlætting ganga hond í hond við møguleikarnar fyri innivisti á røktarheimum og eldrabýlum

Søgan og gamla Havnin
"Tórshavnar Býráð hevur ikki rættiliga fingið um endan, tá tað snýr seg um at vísa fram og lýsa býarsøguna og landssøguna", skrivaði eg í einari grein. Nakað er framvegis um tað.

Kortini er at siga, at ein longri ætlan er um at endurbyggja Mullers Pakkhús við Vestaruvág og brúka tað sum savn og gestamøtøku. Her verður arbeitt í smáum og einar 500.000 krónur játtaðar um árið.

Hetta er gott, men eg eri ikki vísur í, at hetta er nóg mikið. Mær hevði dámt fult so væl, um áhugi býráðsmanna í slíkum málum var størri enn so, og at fleiri av teimum gomlu húsunum í Havnini vórðu tikin upp í ætlanirnar.

Her kann eg sum dømi nevna Vaskaríið í Tórsgøtu, sum kommunan eigur. Tað er so mikið stórt, og hevur so nógvar hæddir, at tað saktans partvíst kann brúkast til at hýsa søvnum av ymsum slag.

Hvat lív hevur ikki verið kring Vágsbotn, sum lýsast kann í hesum gamla pakkhúsi? Tann søgan er ótømandi. Og søvn nýtast ikki at vera deyð hús, hóast tey siga frá søgu. Tvørturímóti. Hyggið bara at Føroya Fornminnissavni í Hoyvík.

Onkuntíð hevur verið nevnt, at vaktarhúsini á Boðaneshamri eiga ikki at sleppa at forfarast. Heldur skuldu tey verið friðað og t.d. verið nýtt til kríggssavn, sum jú er teirra uppruni.

Hetta kundi verið eitt mál fyri Tórshavnar Býráð at tikið sær av. Vøkur eru húsini kanska ikki, men byggilistarliga verða tey upp á sín máta hildin at vera ein perla. Sum samskiftismiðstoð hjá bretska hervalinum undir seinna heimsbardaga høvdu tey stóran týdning fyri Føroyar..

Tora vit? So má tað vera nú!

Katrin D. Johansen

Vit hava skrivifrælsi og trúarfrælsi... men tora vit at loyva skúlafrælsi? Tíðin rennur undan og skjótt má berast at, um vit skulu fáa eina føroyska frískúlalóg.

Týsdagin 12. februar verður aðalorðaskifti um frískúlar í Løgtinginum. Grundarlagið undir orðaskiftinum verður eitt álit og lógaruppskot til eina føroyska frískúlalóg, sum varð liðugt í januar 2000.

Nógvir fyrispurningar – bæði skrivligir og munnligir – hava verið um frískúlamálið síðani, men kortini er einki hent. Tó eru glottar at hóma, tí landsstýrismaðurin Óli Holm tykist at vera positivur. Vónandi ynskir hann, nú folkaskúlin er komin á føroyskar hendur, at vit hava eitt nøktandi lógargrundarlag fyri skúlaverkið. Eitt lógargrundarlag ið er við til at stimbra og fjølbroyta okkara skúlar, so at skipanin gerst liðiligari og møguleikarnir fleiri.

Spennandi verður at hoyra, hvat ymsu flokkarnir hava at siga um málið. Eg eri vís í, at um tingfólk lesa álitið, fara tey at sígggja eina frískúlalóg sum ein møguleika heldur enn eina hóttan. Álitið er at finna á heimasíðu Løgtingsins: www.logting.fo <http://www.logting.fo/>

Vit hava longu ein frískúla í Havn, Adventistaskúlan og honum tørvar eitt veruligt lógargrundarlag. Hvat hevði hent, um vit fingu t.d. tveir aðrar frískúlar í Føroyum at?

– At trýstið á skúlarnar linkaði. Sum kunnugt standa skúlarnir í miðstaðarøkjunum á tremur.

– At foreldur (og lærarar) fingu møguleika at velja nakað annað enn fólkaskúlan. Hetta elvir eisini til nøgdsemi.

– At kapping kom um næmingarnar. Munnu tey flestu ikki gleðast um, at einkarrætturin á flestu økjum er avtikin? Kann nevna Føroya Tele, Tryggingarfelagið Føroyar, Útvarp Føroya.

Møguleikarnir at skipa skúlar á ymsan hátt eru óteljandi. Men at fara undir at reka ein frískúla er ikki hvørsmans føri. Als ikki undir teim treytum, sum føroyska lógaruppskotið setur. Á mangan hátt setur føroyska lógin strangari krøv enn t.d. danska ella norska frískúlalógin. Tað er eisini skiljandi, tí vit liva í einum lítlum samfelag, men tess einfaldari skuldi tað eisini verið at fingið hóskandi lógir á øllum økjum.

Føroysk lóg fyri eftirskúlar kom í gildi í august 2000 og vit kunnu spyrja... hvussu nógvir eftirskúlar eru komnir her síðani tá? Men nú er møguleikin til staðar. Á sama hátt eigur tað at vera á frískúlaøkinum – møguleikin eigur at vera har.

Eitt aðalorðaskifti broytir einki. Tí vóni eg, at landsstýrismaðurin kvikar sær at leggja uppskotið fram, so tingfólk kunnu atkveða um lógaruppskotið.

Hetta er ein møguleiki hjá samgonguni at vísa, at samgongan fremur tað, sum hon hevur sett sær fyri í samgonguskjalinum.

Samgongan og kanska serliga landsstýrismaðurin hevur møguleika at seta ein varða eftir seg, ið verður føroyska skúlaverkinum til gagns.

Viðmerkingar til skrivingina í bløðunum um ferðaætlanina hjá »Teistanum«

Sanna Silvurstein

Tað var ikki meiningin at leggja uppí skrivingina, um fyrsta túrin hjá »Teistanum« á morgni, tí tað skuldi onki verið at skriva um. Men tá Sólvit Simonsen blívir við at skriva sum um at sandoyingar eiga bæði Teistan og Gomlu Rætt, so fái eg ikki latið vera.

Eg haldi, at bæði Sólvit Simonsen og Páll á Reynatúgvu skuldu tikið føroyakortið fram og hugt hvar Sandoyggin liggur í mun til Hest, tað er Skopun, sum liggur nógv longri frá Gomlu Rætt og Hest liggur beint yvir av, sjálvsagt eiga tit tann longra teinin og ikki hestfólk.

Tað ger tað sama, hvussu stórt fólkatalið er úr hvørjum plássinum, tað er framvegis vit, sum búgva 10 min. frá Gomlu Rætt.

Tað tekur ikki nógv longur tíð hjá Teistanum at koma inn í Hest úr Skopun t.d. tá eystfall er, eigur Teistin at sigla heilt heim á Hvannagjógv ella heilt heim á Hol, áðrenn lagt eigur at verða yvir um, tá er bert 1 fjórðingur ella minni heim til bygdina, so tað skuldi ikki verið nakað at tosa um, tí Teistin er góður at sita umborð og siglur skjótt. Vegurin av Gomlu Rætt til Havnar er bæði góður og skjótur at koyra eftir, so tað er onki uttan »hysteriskt« av Sólvit Simonsen at skriva upp og niður um hasar minuttirnar og ikki minni av Páll á Reynatúgvu at hótta við samgonguslitið av somu orsøk.

Nei, Páll góði, tað var betur at tú sum bygdaráðsformaður og landspolitikkari hevði okkurt annað at bjóða tínum oyggjafólkið á eini so stórari vakrari oyggj, enn 10-15 min. meira svøvn.

Tað eru nógv fólk, bæði úr norðoyggjum, Vágunum og aðrastaðni, sum ferðast til Havnar hvønn dag, vit hoyra einki róp og skrál um tað at bussurin skal steðga nógvastaðni á vegnum suður, tí tað er bara natúrligt at steðga á teimum plássunum sum eru á veg suður, líka sum Hest er á veg úr Skopun og inn á Gomlu Rætt.

Um vit skulu samanlíkna uppskotið hjá Páll og Sólvit um ferðaætlanina hjá Teistanum: Skopun-Hest-Skopun-Gamla Rætt, so kundi rutan hjá nólsoyingum tað sama verið Tórshavn-Nólsoy-Toftir-Tórshavn, tað er líka langt við síðurnar av allari fornuft, sum ferðaætlanin hjá Páll og Sólvit.

Nei, nú má tað halda uppat, at hótta við at taka henda túrin frá Hestfólki, tí tað er alt avgerandi at vit fáa trygd fyri, at hesin túrurin er komin fyri at vera, fyri at fólk kunnu seta búgv her, hóast tey arbeiða á megineknum.

Í Hesti er bert skúli til 7. flokk, sostatt mugu vit senda okkara børn til Havnar at ganga í framhaldsskúlan sum nú er skúlaskyldugur.

Eg undirritaða eigi tvey børn sum ganga í skúla í Havn, tey búgva til leigu í Havn, tí vit hava onki álitandi ferðasamband haft síðan tey fóru í skúla í summar. Um lív og heilsa verður skulu vit senda fleiri børn enn, til Havnar í skúla, tí er tað størsta framstig á okkara øki, at vit kunnu fáa okkara børn heim um kvøldið.

Skúlaungdómurin tit harmast um, kann hóast alt ganga í skúla í oynni til tey eru 17 ára gomul.

Sólvit heldur at tað er nógv avgjørt av Sosialinum at fara á forsíðuna við tí at hestfólk eru skuffaðir av Páll av Reynatúgvu og øðrum sandoyingum, tað er tað slett ikki, tí sjálvandi sígggja teir á Sosialinum líka so væl sum alt føroyafólk tað løgna í tí, at tit skulu hava hestfólk at sigla tvær ferð um Skopunarfjørð, fyri at koma inn á Gomlu Rætt, tá tað eigur at taka okkum 10-15 min.

Til síðst vil eg takka Heðin Mortensen, tingmanni fyri sambandsflokkin, hjartaliga fyri at hann tók hetta málið á tingsins røðarapall, tí tað er alt avgerandi at vit fáa henda túrin á morgni og ikki verða hótt í tíð og úrtíð við at vit skulu missa henda túrin.

Eisini vil eg takka Gerhard Lognberg og Eyðun Viderø fyri tað teir skriva í bløðunum, um at Hest er ein natúrligur partur av hesi farleið.

Vónandi dugur leiðslan á Strandferðsluni at sígggja í eyguni at tað er ikki so synd í sandoyingum at seta vekkaran 15 min. fyrr. Og tað at senda hestfólk suður til Skopunar hvønn morgun, er tað sama sum at taka rutuna frá okkum.